Álit

í

løgtingsmáli nr. 42/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin) (Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a., brotsverk ímóti stýrisskipanini og landsmyndugleikum føroyinga, yvirgangur o.a., alvandasom brotsverk, ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin, bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi og brotsverk í familjuni)

Løgmaður, Bárður á Steig Nielsen, hevur lagt málið fram tann 29. oktober 2020, og eftir 1. viðgerð 17. november 2020 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 25. og 30. november, 2. desember 2020, 27. januar, 25. februar og 10. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Sinnisbata og MEGD, Michael Boolsen, fúta, og Bárð á Steig Nielsen, løgmann.

Á heysti 2015 samtykti Løgtingið at heita á landsstýrið um at dagføra og føroyska revsilógina. Hetta er eitt stórt og rættiliga tíðarkrevjandi arbeiði, og dagføringin av revsilógini er tí býtt sundur í hóskandi partar. Hetta hevur samstundis gjørt tað møguligt hjá landsstýrinum og Løgtinginum at viðgera dagføringarnar betur og gjøllari bæði málsliga og innihaldsliga. Higartil eru kapitlarnir 14 til 19 og kapitlarnir 24 til og við 29 dagførdir og føroyskaðir.

Í hesum umfarinum eru tað kapitlarnir 12 og 13 og 20 – 23, sum eru dagførdir og føroyskaðir, og teir snúgva seg um:

Kapittul 12: Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a.
Kapittul 13: Brotsverk ímóti stýrisskipan og landsmyndugleikum føroyinga, yvirgangur o.a.
Kapittul 20: Alvandasom brotsverk
Kapittul 21: Ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin
Kapittul 22: Bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi
Kapittul 23: Brotsverk í familjuni

Arbeiðið at føroyska revsilógina verður gjørt í samstarvi við Málráðið, sum vegleiðir í málsligum ivamálum, og Revsirættarliga Ráðið, sum í høvuðsheitum viðger løgfrøðiliga innihaldið og eisini í ávísan mun málið.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Christian Andreasen, Ingilín D. Strøm, Frimodt Rasmussen, Erhard Joensen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er av stórum týdningi, at okkara revisilóg verður endurskoðað við jøvnum millumbilum. Løgtingið hevur fult lóggávuvald á revsirættarliga økinum. Hetta gevur møguleika fyri at tillaga revsirættarligu reglurnar til føroysk viðurskifti. Tað er týdningarmikið at hava fyri eyga, at viðurskiftini í Føroyum ikki á øllum økjum kunna samanberast við viðurskiftini í Danmark. Tí er ikki nøktandi bara at umseta donsku revsilógina til føroyskt. Løgtingið má eisini fyrihalda seg til innihaldið í revsilógini og tillaga lógina, har tørvur er á hesum. Tað er sjálvsagt eisini neyðugt at tillaga lógina soleiðis, at revsilógin í samband við lógarbrot sum eitt nú landasvik og álop á sjálvsavgerðarrætt eisini ásetir revsing, tá hesar gerðir verða vendar ímóti føroyskum myndugleikum og stovnum.

Rættarnevndin hevur umrøtt spurningin um orðingina av grein 98. Meirilutin metir ikki, at tað er neyðugt at broyta uppskotið, tí greitt er, at orðingin í § 98, stk. 1, sum er soljóðandi: *"Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir við útlendskari hjálp, við valdsnýtslu ella við hóttan um valdsnýtslu at loysa ella leggja Føroyar ella partar av Føroyum undir fremmant vald, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð"* bert umfatar ólógligt virksemi. Ásetingin rakar á ongan hátt lógligt politiskt virksemi.

§ 98 skal skiljast við støði í tí samanhangi, sum ásetingin er sett inn í revsilógina í kapittul 12, sum hevur yvirskriftina *"Landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a.*"

Ásetingin skal sum heild verja sjálvsavgerðarrætt og trygd Føroya og verjir sostatt ytru og innaru trygdina í landinum ímóti álopum og hóttanum.

Landasvik verður vanliga allýst sum grovt brotsverk ímóti einum landi ella landsmyndugleikum, sum ger seg inn á trygdina ella sjálvsavgerðarrættin hjá einum landi.

Revsiverda gerðin í ásetingini er tríbýtt: Útlendsk hjálp, valdsnýtsla ella hóttan um valdsnýtslu og annar løgleysur háttur.

Útlendsk hjálp skal skiljast sum ólóglig útlendsk hjálp. Tað vil t.d. siga við fíggjarligum tvingsli og øðrum tvingsilsfyriskipanum, sum avbyrging og politiskt trýst.

Við valdsnýtslu og hóttan um valdsnýtslu meinast ikki einans við vápnamegi og nýtslu av harðskapi, men eisini víðfevnd tvingsilsráð. Tað krevst tó, at endamálið við valdsnýtsluni ella hóttanin um valdsnýtslu er at fremja kvett ella leggja Føroyar ella partar av Føroyum undir fremmant vald.

Tað er púra greitt, at tað framhaldandi verður fult lógligt við politiskum fólkaræðisligum mannagongdum at arbeiða fyri og at skipa Føroyar sum sjálvstøðuga tjóð.

Undir viðgerðini av málinum hevur løgmaður gjørt vart við, at ein misskiljing er íkomin í týðingini av § 110 e, sum snýr seg um forboðið ímóti alment at háða fløgg. Hetta hevur havt við sær, at flaggið hjá Evroparáðnum er strikað úr ásetingini. Misskiljingin stóðst av, at heitið á Evroparáðnum, sum er stovnur undir ST, er broytt, síðani § 110 e upprunaliga varð sett í revsilógina. Løgmaður hevur mælt nevndini til at skjóta upp at rætta mistakið.

Meirilutin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1) Í § 110 e verður aftan á "Sameindu Tjóðum" sett: "ella hjá Evroparáðnum".

2) Í § 2 verður "1. januar 2021" broytt til: "1. juni 2021".

Viðmerkingar

Til nr. 1
Í týðingini av lógini er flaggið hjá Evroparáðnum av misgáum strikað úr ásetingini. Hetta verður við broytingaruppskotinum sett inn aftur, soleiðis at tað framhaldandi er revsivert at háða eisini flaggið hjá Evroparáðnum.

Til nr. 2
Í lógaruppskotinum er ásett, at lógin skuldi koma í gildi 1. januar 2021. Hetta verður við broytingaruppskotinum broytt til 1. juni 2021.

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg og Hervør Pálsdóttir) hevur hesar viðmerkingar:

Løgtingið samtykti í februar 2010 at yvirtaka málsøkið revsirætt. Síðani tá hava føroyskir myndugleikar havt lóggávuvald á økinum.

Tað hevur tikið sína tíð at fáa føroyskað og tillagað lógina til føroysk viðurskifti. Arbeiðið er tíðarkrevjandi, og hvørt orð hevur týdning havandi í huga, at lógin er grundarlag undir revsing av brotsverkum. Tí er arbeiðið býtt upp í bitar, og nakrir kapitlar føroyskaðir og dagførdir í senn. Seinasta dagføring var í 2019 (løgtingsmál 08/2018). Tá ein onnur dagføring var fyri í Løgtinginum í 2017 (løgtingsmál 44/2016) mælti umboðið hjá Fólkaflokkinum í nevndini frá at samtykkja uppskotið m.a. grundað á, at tað bert snúði seg um at føroyska ein kapittul, og at hetta varð tikið úr eini heild.

Málsliga er tað av stórum týdningi, at revsilógin er á føroyskum, og hetta hevur stóran týdning fyri uppbyggingina av revsirættarliga økinum. Sum flokkur ynskja vit eisini at fáa føroyskt rættarmál og hava lagt uppskot fram um tað nakrar ferðir. Tíverri eru tey feld. Føroyska málið eigur at vera sjálvsagdur rættur allastaðni í Føroyum, og bæði rættar- og revsimál hevur stóran týdning, nú uppbyggingin av eini føroyskari løgfrøðiútbúgving er byrjað á Fróðskaparsetri Føroya.

Ein so týdningarmikil lóg sum revsilógin má sjálvsagt taka støði í tí samfelagnum, hon skal virka í. Tí er tað løgið, at tað verður mett rætt at føroyska lógina heldur enn at gera ásetingar, sum beinleiðis taka støði í føroyska samfelagnum. Okkara samfelag er lítið og gjøgnumskygt, hevur serstaka mentan, lívskor og annað, sum als ikki kann sammetast við danska samfelagið. Tí verður ein týðing av lóggávuni ongantíð nøktandi.

Longu í samband við sjálva yvirtøkuna og í yvirtøkulógini sjálvari er víst á, at tað kunnu standast trupulleikar í samband við innihaldið í revsilógini. Serliga um ásetingar, sum snúgva seg um at verja sjálvsavgerðarrætt føroyinga, og tá ið viðgerast skulu ásetingar, sum koma inn á skipan av fullveldinum Føroyar í mun til danska statin. Hesa støðu eru vit nú komin í.

Vit í Tjóðveldi harmast um, at landsstýrið ikki brúkar møguleikan til veruliga at gera eina føroyska lóggávu, sum tekur støði í verju og vernd av Føroyum og føroyskum áhugamálum. Í staðin er dentur lagdur á at siga, at tað er eitt brotsverk at gera seg inn á suverenitetin hjá danska statinum. Hetta hvørki kunnu ella vilja vit í Tjóðveldi nakrantíð góðtaka. Flokkurin er stovnaður við tí endamáli at skipa Føroyar sum eitt sjálvstøðugt land, sum ikki á nakran hátt viðurkennir seg sum part av danska statinum. Tí mæla vit eisini staðiliga Løgtinginum frá at samtykkja hetta uppskot. Tað er okkara greiða fatan, at hendan lóggávan ger seg inn á alla tjóðskapar- og fullveldisrørsluna í Føroyum. Lógin leggur upp til, at tað er eitt brotsverk at virka fyri at skilja "ríkið" sundur. Hetta er tann politikkur, sum vit loysingarfólk arbeiða miðvíst fyri í øllum okkara virki. Við at samtykkja hetta uppskot verður tað gjørt til eitt brotsverk at arbeiða fyri loysing og fullveldinum Føroyum. Tí skilja vit heldur ikki, at aðrir flokkar, sum í síni stevnuskrá siga seg ganga inn fyri einum sjálvstøðugum Føroyum, yvirhøvur taka undir við, at eitt slíkt uppskot verður lagt fyri Løgtingið.

Av tí, at uppskotið bert fevnir um nakrar kapitlar úr eini størri lóg, sum hava tilknýti til aðrar ásetingar í lógini og hvussu økið er skipað við ymsum myndugleikum, og ikki snýr seg um eina grundleggjandi nýggja revsirættarliga lóggávu ella skipan av økinum, er trupult at gera broytingaruppskot, sum á fullgóðan hátt tekur hædd fyri grundleggjandi sjónarmiðunum hjá minnilutanum. Minnilutin fer tí staðiliga at mæla Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið, sum eftir meting minnilutans beinleiðis ger seg inn á alt arbeiði fram ímóti fullveldinum Føroyum og allari loysingarrørsluni.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 25. mars 2021

Christian Andreasen formaður	Ingilín Didriksen Strøm næstformaður	Frimodt Rasmussen
Erhard Joensen	Steffan Klein Poulsen	Sirið Stenberg

Hervør Pálsdóttir